## Minkandi fiskastovnar í Eystursjónum

Vinnuligi laksafiskiskapurin í Eystursjónum er aftur í minking, eftir at vøkstur hevur verið í fiskiskapinum í fleiri ár. Danmarks Radio veit at siga, at tað eisini hevur gingið niður á bakka við toskafiskiskapinum í Eystursjónum. Londini, sum umsita toskaveiðina, hava gjørt av, at veiðan skal skerjast við 10% um árið, til stovnurin er komin fyri seg aftur. Herfyri steðgaði Pólland sínari veiði fyri restina av hesum árinum, og herfyri steðgaði eisini Týskland sínari veiði, tí kvoturnar vóru uppi.



*Nú gongur aftur niður á bakka við vinnuligu laksaveiðini í Eystursjónum*

## Viksund vind í seglunum

Tað gongur væl hjá Viksund Båt AS í Noregi, og tað eru serliga frítíðarbátar, sum verða smíðaðir. Dagligi leiðarin og høvuðseigarin í gomlu bátafyritøkuni, Rune Viksund, sigur við Fiskaren, at hann er nøgdur við árið 2006. Inntøkurnar vuksu úr heili 83 miljónum norskum krónum í 2005 upp í 99 miljónir krónur í 2006. Í 2002 vóru inntøkurnar hjá Viksund Båt AS 43 miljónir norskar krónur.

*(-vilmund)*





Hjalti í Jákupsstovu:

# Uppskotið langt frá tí, sum vit mæla til



*- Tað hevði verið til stóran bata, um innastu leiðirnar vórðu friðaðar fyri allari vinnuligari húkaveiði, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tað er gott við fleiri økisfriðingum, sum landsstýrismaðurin mælir til, tí hesar gera altíð mun, men tað er spell, at Bjørn Kalsø ikki mælir til at friða innastu leiðirnar fyri vinnuligari húkaveiði, sigur Hjalti í Jákupsstovu**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, hevur í løtuni ikki so góðan hug at gera viðmerkingar til uppskotið hjá Bjørn Kalsø um fiskidagar og avmarkingar í fiskiveiðini fyri komandi fiskiár.

- Vit hava gjørt okkara arbeiði og okkara tilmæli til landsstýrismannin sambært lógini um vinnuligan fiskiskap. Í hesum liggur tað, sum vit hava at siga um vánirnar og útlitini fyri fiskastovnarnar.

### Friðingar gera mun

Hjalti noyðist tó at ásanna, at uppskotið um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap ikki í nóg stóran mun tekur hædd fyri teimum útlitum, ið eru.

- Hetta er langt frá tí, sum vit mæla til, sigur leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, sum í fjølmiðlunum hevur verið í orðadrátti við ein annan fiskifrøðing, Kjartan Hoydal, um eitt nú stovnsmetingar og grundarlagið undir veiðitrýstinum.

Hjalti fegnast tó um, at landsstýrismaðurin mælir til fleiri økisfriðingar, tí økisfriðingar gera altíð mun, sum hann tekur til.

### Innastu leiðirnar

Umframt skerjingar í fiskidagatalinum, nú allar ábendingar siga, at serliga gýtingarstovnurin á toski er óvanliga illa fyri, mælir Fiskirannsóknarstovan til, at innastu leiðirnar verða friðaðar fyri vinnuligari húkaveiði.

- Tað hevði verið til stóran bata, um innastu leiðirnar, sum eru uppvakstrarøki hjá smáfiski, vórðu friðaðar út á tríggjar fjórðingar, men tað vil landsstýrismaðurin sambært sínum uppskoti ikki. Hetta er stórt spell, nú toskastovnurin er so illa fyri, og stór húkaveiða fer fram heilt inn í klettin, sigur Hjalti í Jákupsstovu.



*Hjalti í Jákupsstovu noyðist at ásanna, at uppskotið um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap ikki í nóg stóran mun tekur hædd fyri teimum útlitum, ið eru*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*